## DAGSINS MEINING

# Mennandi leikir

Føroyingar klára seg væl í fleiri ítróttargreinum í Oyggjaleikunum á Oynni Man, og tað fegnast allir føroyingar um Sjálvt tey, sum kanska ikki hava so stóran áhuga fyri ítrótti, fylgja við í útvarpi og sjónvarpi í stórum spenningi og fegnast, tá føroyingar vinna, fáa silvur ella bronsu-heiðursmerki.

Seinast vóru Føroyar nummar sjey, men enn er ov tíðliga at siga, hvat nummar Føroyar verða í ár. Í summum førum er gingið verri enn roknað varð við, t.d. í fimleiki hjá kvinnum, og í øðrum kappingargreinum er gingið betur, t.d. í kvinnufótbolti. Men gongdin higartil bendir á, at heiðusmerkini kanska ikki verða so nógv sum seinast.

Annars skulu vit ikki stara okkum blind at heiðursmerkjum. Tað er sjálvandi stuttligt hjá bæði ítróttarfólkum og øðrum við, at føroyingar vinna. Men vit skulu ikki gloyma, at tað er ein fragd at vera við, og tað at verða tikin út til kappingar er í sjálvum sær eitt avrik og eitt álit.

Í yvirlitinum síggja vit, at umboðini fyri bretskar oyggjar, ella har bretska árinið er stórt, fáa tilsamans rættiliga nógv heiðursmerki. Hetta kemst serliga av tí, at hesi vinna nógv heiðursmerki í einstaklingakappingum, segði leiðarin fyri føroyingarnar, sum kappast í greinum innan frælsa ítróttin.

Í hesum sambandi vísti hann á, at millum ungar føroyingar er stórur áhugi fyri at renna. Eini 1000 ung vóru við í kappingum ífjør, men so legði hann afturat, at umstøðurnar at íðka frælsan ítrótt í Føroyum eru ikki nóg góðar. Í sjálvum høvuðsstaðnum er t.d. eingin rennibreyt.

Og so koma vit til tað: tað skerst ikki burtur, at tað var út av lagi illa atborið, at ein rennibreyt ikki varð gjørd við Tórsvøll. Mótstøðufólkini siga, at áskoðararir sita so langt burtur ífrá, tá fótbóltsdystur er, og at stemningurin tí ikki verður tann rætti. Viðhaldsfólk siga hinvegin, at tað er nakað tvætl, tí tað snýr seg um einar 2-3 metrar afturat.

Vit hava í dag eitt stadionøki í Gundadali, har ónatúrliga nógv virksemi er, og sjálvandi skulu frælsi ítróttarurin eisini havt síni øki og breytir har. Tað var jú eisini ætlanini sambært teimum fyrstu tekningunum til eitt stadionøki, sum eru frá miðskeiðis í farnu øld.

Øll eru ikki líka kring til fótbólt og handbólt, og tað er heilt givið, at vit kundu havt nógv fleiri íðkandi innan frælsa ítróttin, um umstøðurnar vóru betri, og um skúlarnir gjørdu meiri við tann partin. Vit mugu ikki gloyma, at vit skulu eisini hugsa um breiddina ítrótti, kanska fyrst og fremst, siga summi, tí úr breiddini koma úrvalsíðkararnir

Ítróttur er sunnur og er mennandi fyri kropp, sál, felagsskapskenslu, einstaklingin og samfelagið sum heild og tí má samfelagið kenna sínar skyldur. Tað verður eisini gjørt í ávísan mun, men eitt størri arbeiði kann gerast. Men tit, sum hava vunnið: tillukku, og so mugu vit vóna, at tað gongst føroyingunum væl í teimum greinum, sum eftir eru.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Felagið í kríggj ímóti sínum egnu

**Líggjas Høgnesen**

Í hesum døgum fáa brúkarar í fjarhitafelagnum skriv við hóttanum um stongsul og sakførara. 8 dagar ella fellur hamarin. Hóðast undirritaði hevur rindað kr. 1212 um mánaðin seinastu 6 mánaðirnar, hóttir Jóannes Hansen við at steingja heita vatni. Slíkar hóttanir vísir bert hvussu torført tað er hjá okkum brúkarum at samskifta við stjóran Jóannes Hansen. Hetta skriv er tó ikki vent ímóti stjóranum. Óteljandi skriv eru send stjóranum, men har er sum kunnugt eingin heima. Skrivið er heldur ætlað sum ein vekjara klokka til onkran býráðslim.

**Býráðsins leiklutur.**
Býráðið hevur skyldu at tryggja at eingin mismunur verður gjørdur á borgarum í Tórshavnar Kommunu. Eg kann taka eitt dømi. Ein granni hjá mær skal í ár rinda kr. 2100 um mánaðin. Tað svarar til kr. 25.000 um árið. Sjálvur skal eg rinda uml. kr. 20.000 í ár fyri hita og heitt vatn. Eitt meðal húsarhald við oljufýring rindar uml. kr. 9000 um árið. Er nakar munur? Nei bert kr. 16.000

**"License to kill"**
Kanska áttu vit at bjóða italsku mafiuni heim til Føroyar og víst teimum, at tað ber til at føra ein modernaðan, brutalan handilspolitik uttan at drepa nakran. Við Býráðsins vælsignilsi sleppur stjórin at sveiggja við svørinum sum honum lystir. Gongst illa í felagnum, - fer oljuprísurin upp, - hevur stjórin brúk fyri meira peningi til viðlíkahald, ja so hækkar hann prísin. Einki hjálpir hvussu vit spara. Nýtslan hevur lítlan týdning. Hetta havi eg áður víst á.

**Politisk lyftir.**
Hetta er ein innilig áheitan á Jan Christiansen, sum undan býráðsvalinum svór at hann fór at gera nakað við óskilið í fjarhitafelagnum. "Now is the time", harra borgarstjóri.

**Í rættin við fjarhitafelagnum**
Nú er nokk tosað. Til eigarafeløgini ! Lat sakførara fáa møguleika at kanna juridiska partin í málinum, soleiðis at vit "einaferð med alla" fáa staðfest, um felagið verður rikið á ein lógligan hátt smb. galdandi reglum ella ikki. Hava vit rætt, so eigur málið at koma fyri rættin.

**Lógina í egnar hendur.**
Kemur Jóannes Hansen inn í mín kjallara at gera herverk, so skal hann vita at hann verður meldaður til løgregluna. So einkult er tað.

# Fróðskaparfelagið skipar fyri FRÓÐARFUNDI í oktobermánaði

TÍÐINDASKRIV

*Vegna Føroya Fróðskaparfelag*
*Dánjal Petur Højgaard, formaður*

Fróðskaparfelagið fer nú at víðka um virksemi sítt við at birta upp undir framtíðar granskingarverkætlanir í Føroyum. Til tess at bøta um samskiftið millum føroyskar granskarar og til at mennavaksa um føroyska granskingarumhvørvið, er ætlanin at halda ein FRÓÐARFUND, kl. 10-16 leygardagin 27. okt. 2001. Fundurin er fyri øll, ið eru útbúgvin á lærdum háskúlum ella samsvarandi, og sum fáast við gransking. Fundardagurin byrjar við innbodnum fyrilesara, ið greiðir frá hugtakinum "at granska". Fundarfólkið fer síðan í bólkum at gera uppskot til komandi verkætlanir. At enda verður felagsfundur um uppskotini.

Á fundinum er eisini ætlanin, at føroyskir granskarar kunnu hittast til tess at styrkja sambandið sínámillum og annars skifta orð um framtíðar granskingarverkætlanir í Føroyum. Tey ymsu frøðiøkini fáa høvi at skifta orð hvørt sær; men eisini er ætlanin, at tvørfrøðiligar verkætlanir verða orðaðar.

Fundurin verður hildin í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Longu nu kann verða boðað frá luttøku hjá Føroya Fróðskaparfelag, handan Á 5, postrúm 209, FO-110 Tórshavn (teldupostur: maudh@setur.fo)

Tilskilið navn, frøðigrein, útbúgvingarstig og granskingarøki.

Um ein vil vita meira um tiltakið, ber til at seta seg í samband við formannin Dánjal Petur Højgaard, teldupostur: danjalph@post.olivant.fo

Føroya Fróðskaparfelag er stovnað í 1952 og hevur eitt nú til endamáls at fremja samstarv millum fólk í Føroyum, sum takast við vísindaligt starv, at upplýsa alment um vísindalig viðurskifti við útgávuvirksemi og fundum og at menna føroyskt sum vísindamál.

Bøkur og rit, ið Fróðskaparfelagið gevur út, eru fyrst og fremst Fróðskaparrit, Supplementa til Fróðskaparrit og Frøði. Haraftur at koma orðabøkur og einstakar aðrar bøkur.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at elskaði maður mín, pápi og abbi okkara

**Hans Olaf Debes**
**av Oyri**

andaðist mikudagin 11. juli á Landssjúkrahúsinum,
76 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju
sunnudagin 15. juli kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Palla og Sámal**

Tey, ið vilja minnast Hans Olaf,
kunnu lata eina peningagávu til kirkjuna í Norðskála


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.